DAGSINS MEINING

Samstarv í Útnorði

Útnorðursráðið hevur júst havt ársfund í Føroyum. Útnorðursráðið er eitt ráð, ið er sett saman av tingmonnum út Íslandi, Føroyum og Grønlandi. Soleiðis sum viðurskiftini eru í Útnorði er ivaleyst nógv at samstarva um. Londini í Útnorði hava á mangan hátt einsháttaðar fortreytir. Øll trý lond liva av fiskivinnu, og havumhvørvið og havsins livandi tilfeingi hevur tí tann størsta áhuga hjá øllum í hesum trimum londum.

Útnorðursráðið hevur tí altíð sýnt Norðuratlantshavinum og havumhvørvinum stóran áhuga. Útnorðursráðið hevur skiftandi høvuðsevni á skránni og í ár er tað so heilsustamstarv í Útnorði, sum hevur ráðsins áhuga. Heilsa og heilsuviðurskifti í Arktis og sostatt eisini í Útnorði er eitt sera aktuelt mál júst í hesum døgum. Stórar kanningar, har eitt nú føroyingar hava tikið lut, hava víst, at tað er ikki vandaleyst at nýta havsins súgdýr sum føði. Hetta hendir samstundis, sum vit her í Føroyum halda fast um rættin at drepa grind og íslendingar eru farnir undir aftur avmakraða stórhvalaveiðu. Alt hetta fer ivaleyst at føra til eitt størri trýst frá umhvørvisfelagsskapum. Hartil kemur politiskt trýst. Sum kunnugt hevur USA longu nú lagt stórt trýst á Ísland til tess at fáa landið at gevast við sildrekaveiðuni.

Umframt Útnorðursráðið hevur ráðgevandi bólkur hjá Arktiska Ráðnum hildið fund í Føroyum. Hesin bókur, har Føroyar hava umboð, fylgir við umhvørvinum í Arktis. Hóast Føroyar ikki kunnu sigast beinleiðis at vera partur av Arktis, so hevur nógv, sum hendir í Arktis, ávirkan á tað, sum hendir her hjá okkum. Hetta er serstakliga galdandi fyri náttúruna og fyri burðardygga nýtslu av havsins ríkidømi. Sum kunnugt er almenningurin í Vesturheiminum hart ímóti, at livandi tilfeingið í Norðurhøvum verður troytt. Hetta er í sjálvum sær ein hóttan. Ein onnur hóttan er tann dálking, sum kann gera tað vandamikið at eta sjóføði. Hendan dálking kemur í stóran mun frá teimum, sum vilja nokta okkum í Útnorði at troyta havsins tilfeingi. Besti háttur til tess at takla hesar trupulleikar er at samstarva. Tað er tí sera umráðandi, at politiska samstarvið í Útnorði verður ment og styrkt. Eisini er umráðndi, at hetta samstarv verður víðkað til londini í Arktis. Fleiri av hesum londum t.d. Rusland og USA eru millum stórsyndararnar, tá vit hugsa um dálking av havinum, samstundis sum tey hava stóran áhuga fyri náttúru og umhvørvi í Norðurhøvum. Her er ivaleyst nógv at tosa um og nógv at samstarva um.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Dumpaður varaløgmaður

Høgni Hoydal so frustreraður og óseriøsur, at mær tykir synd í honum

Bjarni Djurholm

Høgni Hoydal (HH) fullvæl.

Sum ikki einaferð, tá tjóðveldið hevur rent seg á turt, so verður farið eftir manninum heldur enn eftir bóltinum. Í málinum um arbeiðsmarknaðaruppskotini hevur semja verið í landsstýrinum um, at undirritaði skuldi fyrireika lógaruppskot til dagførda lógávu.

Samt landsstýri ásannaði, at aftaná ártíggju og nógvum royndum at fáa partarnar á arbeiðsmarknaðinum at greiða viðurskiftini – uttan úrslit, so var neyðugt at leggja á annan bógv.

Semja í landsstýrinum

Á landsstýrisfundi fyrst í juni í ár legði undirritaði fram upprit og uppskot um nýggja lóggávu á arbeiðsmarknaðarøkinum. Semja var í landsstýrinum um, at skil skuldi fáast á viðurskiftunum sum skjótast, og fekk undirritaði undirtøku fyri at arbeiða víðari við lógaruppskotunum.

Seinast í juni legði løgmaður so endaligu lógaruppskotini fyri landsstýrisfund. Undirritaði var burturstaddur. Samt landsstýrið tók undir við uppskotunum, og avráddi at senda uppskotini til løgtingslimirnar í samgonguni, og at undirritaði skuldi kalla partarnar á arbeiðsmarknaðinum saman at viðgera lógaruppskotini (allir tjóðveldislandsstýrismenninir vóru á fundi).

Vinnumálaráðið avgreiddi uppskotini til løgtingslimirnar samb. fundarfrásøgnini. Bíðað varð til undirritaði kom aftur úr summarfrí at senda lógaruppskotini til partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Hetta var gjørt í vikuni undan ólavsøku. Samstundis varð boðað til fundar at viðgera uppskotini. Ikki eitt orð í fjølmiðlunum. Tað veit an sannleika, so pseudoborgarligu sjónarmiðini tjóðveldisfloksins ikki verða avdúkað.

Synd í Høgna

Tí var neyðugt hjá HH at exponera á undirritaða í Degi og Viku friggjakvøldið. Óseriøst at illgita, spilla út og bera ósannindi um arbeiðsmarknaðaruppskotini eins og onnur vinnumál. Tað næsta verður óivað, at HH fer at boða frá, at hann má taka málini aftur til viðgerðar í landsstýrinum fyri at bjarga tí, ið bjargast kann?? Ósmædnið kennir so eingi mørk.

Hinvegin tykir mær næstan synd í HH. Skilji væl, at hann kennir ómegd, tá hugsað verður um hansara politisku avrik farnu fimm árini. Samanborið við alt garterilsi, munnu føroyingar neyvan áður hava bíðað so leingi eftir so lítlum. Men sjálvsagt, hini hava kanska skuldina?

Pátikna sjálvsimagiið, har HH er exponentur fyri tí góða og nýggja, meðan hini umboða tað gamla og fordervaða, avdúkar ein hugburð, sum mangan er orsøk til stríð. Hetta man ikki minst flokkur hansara sanna.

Velji annars at bera yvir við HH og taka hansara frustratiónir sum eitt kompliment.

Málið ikki slept

Arbeiðsmarknaðaruppskotini eru so týdningarmikil, at arbeitt verður áhaldandi við teimum eftir landsstýrissamtyktunum, uttan mun til hvat tjóðveldið nú sigur. Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru bidnir um at svara Vinnumálaráðnum í seinasta lagi 29. september. Vinnumálaráðið fer so at viðgera innkomnu svarini, og vera partarnir so aftur kallaðir til fundar.

Tað er eingin ivi um, at atferð tjóðveldisfloksins hevur skaðað málið almikið, tí hvørjum skal arbeiðsmarknaðurin nú trúgva? Men tað var kanska meiningin. Tí verður staðiliga heitt á HH og tjóðveldið at halda fast við landsstýrissamtyktirnar, at standa við givin lyfti og at virka samsvarandi.

Undirritaði sleppur so ikki málunum. Torir tjóðveldið ikki, so fer tað at bíða eftir avgerð løgmans.

Verð reiðiligur

Sól og undanvindur hava eyðkent búskapin farnu 7 árini. Nú dregur hann á luftina, og tað lotar ímóti. Kanska ætlar tjóðveldið at sleppa úr samgonguni. HH átti tí at verið reiðiligur og sagt sum var. Ella er øll henda fjøðlmiðlaøði fyri at káva yvir væleydnaða ríkisfundin hjá løgmanni? Livst so spyrst.

Eini ráð til HH. Kom til arbeiðis. Tímir tú ikki, lat so hini fáa arbeiðsfrið.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Hví gjalda so høgan skatt?

Torkil V. Rasmussen
Fyrrv. formaður í Fólkafloksungdómi

Skattur er, eins og hann er inntøka fyri eitt land, eisini eitt búskaparpolitiskt amboð at skapa javna millum fólk. Ella hetta er tað, ið føroyskir og útlendskir sosialdemokratar leingi hava billað fólki í útheimi og her heima á klettunum inn. Rætt er tað, um vit skulu hava ein dýran og ikki minst stóran, ella, sum tað hevur víst seg í teimum norðurlendsku universellu vælferðarmynstrunum, almenna geira, so er neyðugt at skaffa penin til figging. Tað hevur víst seg, at hægri skattaprosentið í einum landi er, samsvarandi minni gerst tann samlaða miðal arbeiðstíðin hjá tí einstaka borgaranum.

Marginalskattur verður allýstur at vera tann skattur, ið goldin verður av tí síðst tjentu krónuni. Eitt dømi uppá marginalskatt er: Um inntøkan er 400.000 um árið og verður hækkað til 430.000, og skattainntøkan hækkar úr 180.000 til 200.000, so verður marginalskatturin 66,6%.

Ikki er tað uttan orsøk, at borgarligir politiskir flokkar í flestu londum í vesturheiminum hava verið við til at minka marginalskattin til at økja um hugin hjá tí einstaka at arbeiða.

Amerikanski búskaparfroðingurin Laffer vísti á samanhangin millum arbeiði og ta samlaðu miðal skattainntøkuna. Hann vísti á, um skatturin fer yvir eitt víst støði, so fáru inntøkurnar til landið at minka. Orsøkin til tess var og er, at ov nógvur skattur tekur hugin frá fólki at arbeiða burtur. T.d. økir eitt ov høgt skattaprosent um virkni á tí svarta marknaðinum, minkar uppá ta privatu nýtsluna hjá húsarhaldinum og harvið keypiorkuna, sum samlað ger, at inntøkurnar til landið eisini minka.

Sum mát fyri vælstandinum í einum samfelag verður BTÚ (Bruttotjóðarúrtøka) pr. íbúgva nýtt. BTÚ pr. íbúgva verður allýst at verða tann hátturin at geva upp tað samlaða virðið av framleiðslu, sum hendir í virkjum, handlum, fyritøkum, o.ø. arbeiðsplássum, har síðan virðið av rávørum o.ø. sum eru við til at skapa framleiðsluna verða mótroknað.

Eisini verða almennar veitingar máltar í % av BTÚ. Í árinum 1962 vóru tær almennu veitingarnar 9% av BTÚ og í 1997 vóru tær 28%. Ein av orsøkunum til hesa gongd er økingin í skattingini og útreiðslunum, ið danski statturin hevði av tí almenna geiranum í Føroyum.

Líta vit aftur á árið 1962, so er at siga um skattainntøkurnar, at tær vóru 18,8% av BTÚ. Leggja vit donsku veitingarnar aftrat, so er tann almenni parturin 29,4% av BTÚ. Í árinum 1997 var skattligi parturin heili 45,8% av BTÚ, og verða donsku veitingarnar og stuðulskipanir lagdar aftrat, so gerst hin almenni parturinheili 68% av BTÚ!! Hetta vil í stuttum siga, at tann almenni parturin var 2,3 ferðir størri í 1997 enn í árinum 1962.

Kanningar benda á at fyri hvørt oyra, sum verður goldið meira í skatti, kostar tað búskapinum meiri enn tað oyra, ið varð goldið. Um føroyski búskapurin skal broytast frá einum spakuligum ella linum vøkstri uupá 3,4% um árið til eitt skjóttvaksandi búskaparvøkstri uppá 6% um árið, má skattatrýstið liggja á góðum 23% av BTÚ. Taka vit eitt dømi uppá eina lága løn t.d. 14.000 kr. um mánaðin t.e. 168.000 kr. um árið í Tórshavnar kommunu, og vit ganga út frá árinum 2002, so fara uml. 45,5% í skatti um árið tvs. 76.369 kr. haraftrat koma húsarhaldsútreiðslur o.a. sum ger, at vit kunnu venda aftur til byrjanina, ið vísur okkum á ta minkandi keypiorkuna, hugin til at arbeiða og tað økta svarta arbeiði, ið ikki gevur serligan búskaparvøkstur.

Fáið skattin niður, og ikki minst marginalskattin! Sparið uppá útreiðslurnar og økið um inntøkurnar! Arbeiðið eftir borgarligum leisti! Veljið heldur skattalætta enn lønarhækkingar! Lønarhækkingar resultera í prísvøkstri sum ger, at í síðsta enda er einki vunnið!

Óhugnaligi veruleikin!

Símun A. Klein

Hvussu áhugavert er tað ikki at síggja, hvussu politikkararnir ringja seg saman og fara í holt við at broyta lógina ferð eftir ferð, hvørja ferð teir verða fangaðir í at bróta lógina í landinum? (Slíkt er fari fram í áravís nú). Men eftir at politikkararnir eru uppdagaðir í sínum svikum, so hendir ikki stórvegis meira enn tað, at politikkararnir hereftir fara at skava útyvir alt skarnið, ið teir hava framavla í landinum, eins og kettan ger við sítt skarn, eftir at hon er sloppin av við sítt. Meiri hendir so ikki í málunum, og eingin verður sektaður (burtursæð frá skattgjaldaranum, honum sum nýtir musklarnar at arbeiða við). Eingin sekur verður koyrdur. Skuldi tað nú hent, at ein politikkari ger okkurt gali, og sekt skal leggjast á, so er tað landskassin ið gjaldar og ikki hin einstaki politikkarin. Men um hin meinigi maðurin forbrýtur seg, so má hann gjalda fyri tað sjálvur, altso muskularbeiðandi persónurin rindar í báðum førum, meðan politikkarin altíð kemur at sita og skúma róman, líka mikið hvussu víkir og vendir. Og veljarin situr bert og gløðir um ein mua og sigur einki. (Lógarfrasan: »Øll eru líka fyri lógini, er tó ikki tilrokna teimum, sum sita við ræðið í landinum á sínum ymsu plássum í landinum«).

Hóast alt hettar, so siga allir politikkararnir sum við ein munn, at Føroyar eru ein kristin tjóð? Men ímillum politikkarar sita eisini fleiri av teimum, sum eisini hava leiðandi leiklutir í sokallaðum kristnum samkomum, hvilket tragiskt syn! – Hyklariið leingi livið! – Tit kunnu ikki tæna Guði og Mammon, tit kunnu ikki ríða á tveimum hestum samstundis, tit kunnu ikki verða kristindómsins tænarar og politikdómsins tænarar! – Men jú siga tit hóast hettar beint ímóti slíkum allíkavæl. Tit fáa løn fyri at bróta alt, sum er rundanum tykkum, bert tit ikki fara fyri skeyti sjálvir.

Prestarnir í fólkakirkjuni eru statsstýrdir og fáa harvið ikki loyvi til at læra út frá bíbliuni, tí ger ein slíkur prestur tað, so verður hann koyrdur við brestin. Men jú størri rotinskapurin í landinum veksur, jú størri og dýrari kirkjur og samkomuhús vera bygdar við sínum ekstremt dýrum innrættningum, heldur enn at neyðstødd fingu hesar peningaupphæddir til góðar í staðin fyri. – Eg var svangur, men...?

Men tað flottasta av øllum er, at bíblian sigur klárt, at øll, ið halda seg til lógverk, eru undir banni! (Gal. 3:10). So vita tit nú, øll tit, sum forsvara lógina í landinum, hvørjum tit liva og hoyra inn undir, ikki so?

Jamen, hattar meintist við móselóg og hevur einki við okkum at gera, siga tey flestu. Ja, helst tað, men vit skulu minnast til, at móselóg sum tó var hildin fyri at innihalda ávísa dýrd í sær, ikki var nakað annað enn ein tænasta fordømingarinnar, men harvið mugu vit ongantíð halda, at vit á okkara døgum duga nógv betur at smíða lógir, enn smíðararnir av móselóg, nei, okkara landsins lógir í dag eru á nógv nógv lægri støði enn móselóg, og politikkarar fara ongantíð at koma upp til knýggja á smíðarunum á móselóg, hvørs lóg als ikki kundi nýtast allíkavæl til frelsu, bjarging og bata í samfelagnum. Tí, var Móselóg bert ein tænasta fordømingarinnar, hvussu ikki mikið meira verður lógarsmíð á okkara døgum júst tað sama? Men löggevingin í Føroyum gevur einamest ágóða til politikkararnar sjálvar við familju, men annars ikki tað stóra til hini, tíverri. Eins og ísraelsfólk í forum høvdu Móselóg, so hava vit á okkara døgum eina Egoistlóg, tilevnað av politikkarum einans til signing fyri politikkarar sjálvar, men við ágóðanum, sum annars tilhoyrir Palleba og Josefinu!

Jú fleiri kirkjur og samkomuhús við bygdar vera í landinum, jú færri kristin vera í landinum. – Hettar er altíð til allar tíðir eitt álítandi barometur!

Einfaldar loysnir til veiku føroysku fjølmiðlarnir

Rógvi Absalonsen

Leygardagin 16. august var grein í Dimmalætting, har Kári Durhuus og Per Højgaard, fyrrverandi útvarpstíðindamenn finnast at føroyskum fjølmiðlum at vera ov veikar og geva politikarum og embætisfólkum ov lætt spæl. Síðani verður lagt afturat, at fjølmiðlarnir ikki hava figgjarliga orku til at vera vakthundar í samfelagnum. Hetta kann væl passa í ein mun, men eg eri sannførdur um, at fjølmiðlarnir kunnu gera ein størri innsats hóast figgjarligu støðuna.

Tað hevði verið ynskiligt at føroysku fjølmiðlarnir høvdu torað betri at funnist at og onkuntíð brúkt eitt sindur subjektiviteti í sínum viðgerðum av málum. Hyggja vit út í heim bera fjølmiðlarnir seg at júst á henda hátt, og ikki sum í Føroyum. Ikki tað at meiningin hjá tíðindamanninum skal koma fram í hvørjari søgu, men heldur, at einstaki tíðindamaðurin sleppur at seta sín dám á søguna, við at koma við egnum metingum um hvat hann sjálvur hevur fingið burturúr at viðgera eitthvørt mál. Hetta er hóast alt persónurin, sum hevur tosað við viðkomandi fólk og hevur nógv best innlit í evnið, so hví skal hann ikki eisini sleppa at siga sína hugsan?

Tann mest vanliga føroyska fjølmiðlasøgan í dag inniheldur nakrar spurningar til nøkur viðkomandi fólk, sum síðani verða svaraðir, og so hevur tíðindamaðurin nøkur fakta at siga frá í byrjan og enda. Eitt er, at hetta ikki er serliga áhugavert at lesa. Men tað er enn verri at serliga politikarar fáa alt ov leysar teymar og vera ikki lagdir undir nóg stórt trýst frá fjølmiðlunum.

Seinastu vikurnar hevur mikið orðastríð verið millum limir í sitandi samgongu. Hóttanir av ymsum slag hava fokið millum partarnar, og í øllum meldrinum sita fjølmiðlarnir og skriva greinar upp og niður um, hvat øll illsinnavættini hava sagt. Í staðin skuldu fjølmiðlarnir spurt seg sjálvar, hví ólukkan politikararnir ikki ringja beinleiðis til hvønn annan, í staðin fyri at brúka fjølmiðlarnar sum talurør. Jú meira hugsa verður um hetta, sannlíkari tykist tað vera, at fjølmiðlarnir blíva útnyttaðir.

Eg sakni eitt sindur meira forvitni frá teimum tíðindamonnunum, sum dagliga tosa við politikarar og embætisfólk. Sum nú er, tykist tað, sum tíðindamenninir bara taka ímóti og skriva niður, uttan at spyrja ágangandi spurningar ella gera egnar niðurstøður. Sjálvandi skulu tíðindamenn vera sakligir í sínari viðgerð, og sjálvandi skulu teir ikki gera eina framløgu av síni egnu ideologi, men eitt sindur meira ágrýtni og dirvi hevði gjørt væl meiri gagn enn skaða.

Um ein hyggur út í heim, hava fjølmiðlarnir nógv størri vald, við tað at teir tora at lata tíðindamenninar siga sína egnu hugsan um málini, teir viðgera. Møguliga fáa føroyskir tíðindamenn ikki loyvi til hetta, men eg eri sannførdur um, at høvdu teir sjálvir valt, so høvdu teir gjørt tað sama sum starvsfelagarnir úti í heimi, tí tað ger arbeiðið nógv áhugaverdari, samstundis sum teir røkja sínar skyldur nógv betri.

Vónandi fáa fjølmiðlarnir eyguni upp fyri hesum, soleiðis at fjórða statsvaldið veruliga kann fáa ta ávirkan, hon hevur í flestu øðrum londum í vesturheiminum.